# Miðlamjarr

*LAGT TIL RÆTTIS:* Eyðun Klakstein / Inna Törnroos

Ætlaði at taka nakrar túrar runt vatnið, men onkur hevði longu tikið teir.
***Maður, 43 ár***




*Hinar kvinnurnar í Hollywood dáma meg ikki longur*

Kelly Osbourne um at tapa seg 22 kilo

*„Altjóða skinku-marknaðurin er risastórur, og tí eru spennandi møguleikar í at útflyta føroyska skinku*

Johan Mortensen hevur fingið gott hugskot



*„Eingin skipan er, sum hjálpir luttakarunum víðari, og tað kann eg ikki verða við til*

Remee um, hví hann gavst sum dómari í donsku X Factor kappingini (BT)





*„Fucking embarrassing*

Norðurírski venjarin, Nigel Worthington, var ikki blíður eftir javnleikin ímóti Føroyum týskvøldið (Sosialurin)

Møtti einari myrkari damu við ringi í nøsini inni á Strøgnum í dag.
**Hon:** Kender du til Greenpeace?
**Eg:** Ja!
**Hon:** Hvad synes du om vores arbejde?
**Eg:** Jeg slagter hvaler, når jeg har mulighed for det
**Hon:** God weekend
**Eg:** Tak i lige måde
***Maður, 23 ár***

*„Úrslitini tala mína søk*

Landsliðsvenjarin Brian Kerr um, at hann vil hava landsliðið at spæla á Svangaskarði





*Eg vil, at míni børn skulu vita, nær eg eri ill, nær eg eri glað og nær eg eri forvirrað!*

Julia Roberts um hví hon ikki vil nýta botox

Í hesum sparitíðum er kanska tíð til at listaumhvørvið vísir samhuga; Tónleikarar spæla hálvtónar og pausutónar, ljósmenn nýta spariperur, málarar strúka tað mesta og yrkjarar vanda sær um orðini. Seymikonur nýta sjálvandi tráðleysar seymimaskinur.
***Maður, 43 ár***

Havi forrestin eitt genialt hugskot. At handverkarar fáa weekend mikudag á middegi. Serliga teir, ið bjálva hús. Tú Himmalins teir larma. Við borimaskinum, hamara, sleggjum, sað og you name it.
***Kvinna, 40 ár***